


# Superyacht á vitjan

## Octopus er størsta marglætisskipið hjá Microsoft stovnaranum, Paul Allen, og tað virjaði á Havnini um ólavsøkuna

Leo Poulsen


*Octopus varð áður roknað sum heimsins størsta privata marglætisskip*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Paul Allen er eitt ikki so kent navn, sum Bill Gates, men saman vóru teir kortini um at stovna Microsoft.

Men í mun til Bill Gates, sum javnan traðkar alment fram, heldur Paul Allen seg fyri tað mesta fyri seg sjálvan.

Tá Paul Allen fyri nøkrum árum síðani fekk staðfest krabbamein, tók hann seg aftur frá arbeiðinum, skrivaði sær ein lista yvir tað, hann skuldi náa, áðrenn hann doyði, og fór síðani avstað at útynna hetta.

Lagnan vildi tað tó soleiðis, at hann varð grøddur, men komin nakað upp í árini og bardur av viðgerðini er hann ongantíð farin aftur til verka, tó at hann situr í nevndini fyri Microsoft.

Paul Allen er ikki nøkur fátækrarotta. Størsta marglætisskip hansara er á støðd við Smyril, og hevur millum annað tvær tyrlur umborð, umframt ein 65 fót bát og ein undirvatnsbát í kjølinum. Svimjihylur er sjálvsagdur og eisini hevur hann fleiri vatnskutarar umborð.

Alment verður upplýst, at skipið kostaði 1,2 milliardir krónur, tá tað fór av bakkastokki í Týsklandi, men mett verður, at veruligi kostnaðurin er omanfyri tvær milliardir.

Paul Allen er áhugaður í ítrótti, og eigur Seattle Seahawks, ið spælir amerikanskan fótbólt, Seattle Sounders, ið er eitt fótbóltslið og Portland Trailblazers, ið spælir kurvabólt.

Hann eigur eisini tvey minni marglætisskip, tað næststørsta hevur eisini eina tyrlu umborð. Umframt eigur hann eina røð av bygningum í Seattle, har hann er føddur og býr, eins og Bill Gates.

Paul Allen er sum nevnt ógvuliga afturhaldin og tosar ikki við fjølmiðlar, men ein talsmaður hansara segði í farnu viku við Seattle Times, at Microsoft stovnarin hevur í hyggju at geva burtur meginpartin av ogn síni til vælgerandi endamál. Paul Allen er verdur umleið 75 milliardir krónur.

Til stuttleika kann nevnast, at hálvi føroyingurin, Vilmund Boggs, arbeiðir hjá Paul Allen sum tyrlumekanikari, og tí javnan er umborð á Octopus – tó ikki á hesum túrinum í Føroyum.

Octopus kom á Havnina um 10-tíðina týskvøldið og fór avstað aftur eftir kappróðurin ólavsøkuaftan.



## Ivan Eginsson,
ólavsøkugestur

**Hvat hevur ólavsøkan at týða fyri teg?**
- Ólavsøkan er uttan iva tann týdningarmiklasti dagurin í árinum. Eg ferðist sera nógv, men eg royni altíð at leggja ferðirnar soleiðis, at eg kann vera heima í Føroyum á ólavsøku.

**Hvat hava tey føroysku klæðini at týða fyri teg?**
- Eg havi átt føroysk klæði í átta ár. Fyri at vera heilt erligur, so hevði eg ikki tímað at farið á ólavsøku uttan tey føroysku klæðini. Eg hevði følt meg illa.

**Hví eru klæðini serlig?**
- Tey føroysku klæðini eru heilt serlig. Tú finnur onganstaðni ein slíkan tjóðarbúna, ið so stórur prosentpartur av fólkinum eigur. Harafturat gera tey føroysku klæðini fólk vakrari.

**Ætlar tú á ólavsøku í næsta ár?**
- Í fjør var eg burturstaddur á ólavsøkuni. Tá skrivaði eg á Facebook, at tað var síðsta ólavsøkan, sum eg misti. Vónandi fer tað lyftið at halda.

### Í MORGIN

10/13 °C



4-9 m/s | 1-6 m/s

Fleyr til gul av landnyrðingi og norði og møguliga regn eirtt skifti, annars turt og sólglottar, tó mjørki í støðum. Hitin millum 10 of 13 stig.

### SUNNUDAGIN

11/14 °C



1-6 m/s | 5-10 m/s

Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi og regn eitt skifti, seinnapartin minni vindur og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.

### MÁNADAGIN

11/14 °C



1-6 m/s | 1-6 m/s

Fleyr til gul av útnyrðingi, seinnapartin av ymsum ættum. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Lot til andøvsgul av ymsum ættum og sólglottar, men eisini ælingur. Hitin millum 10 og 14 stig.

### LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 1000 hPa. í útsynning úr Íslandi fer spakuliga eystureftir. Brúgvalagið haðani verður í høvuðsheitum sunnan fyri Føroyar.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið í útsynning úr Føroyum fer spakuliga eystureftir og grynnist.

### HITALAG




### AVFALL




Miðal: 70 mm

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | 5 | Tromsø | 6 | Moskva | 16 | Athen | 26 |
| Reykjavík | 11 | Bergen | 12 | Berlin | 25 | Beijing | 30 |
| Tórshavn | 10 | Oslo | 22 | Paris | 20 | New Dehli | 30 |
| Lerwick | 9 | Stokkhólm | 20 | Madrid | 28 | Bangkok | 34 |
| Aberdeen | 12 | Keypmannah. | 19 | Róm | 26 | Sydney | 14 |
| London | 19 | Helsinki | 16 | Malorca | 26 | New York | 33 |



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

### VESTFALLSKYRRINDI

26. juli – Fullmáni
29. juli – Mánin longst frá jørðini
3. august – Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 30. juli | 10:23 | 22:40 | 09:23 | 21:40 | 09:38 | 21:55 | 00:06 | 12:23 | 01:06 | 13:23 |
| 31. juli | 10:57 | 23:16 | 09:57 | 22:16 | 10:12 | 22:31 | 00:40 | 12:57 | 01:40 | 13:57 |
| 1 . aug. | 11:35 | 23:55 | 10:35 | 22:55 | 10:50 | 23:10 | 01:16 | 13:35 | 02:16 | 14:35 |
| 2. aug. | - | 12:15 | 11:15 | 23:49 | 11:30 | - | 01:55 | 14:15 | 02:55 | 15:15 |
| 3. aug. | 00:49 | 13:24 | - | 12:24 | 00:04 | 12:39 | 02:49 | 15:24 | 03:49 | 16:24 |

| Dagur | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 30. juli | 08:38 | 20:55 | 07:38 | 19:55 | 10:38 | 22:55 | 11:38 | 23:55 | 10:08 | 22:25 | 11:23 | 23:40 |
| 31. juli | 09:12 | 21:31 | 08:12 | 20:31 | 11:12 | 23:31 | - | 12:12 | 10:42 | 23:01 | 11:57 | - |
| 1 . aug. | 09:50 | 22:10 | 08:50 | 21:10 | 11:50 | - | 00:31 | 12:50 | 11:20 | 23:40 | 00:16 | 12:35 |
| 2. aug. | 10:30 | 23:04 | 09:30 | 22:04 | 00:10 | 12:30 | 01:10 | 13:30 | - | 12:00 | 00:55 | 13:15 |
| 3. aug. | 11:39 | - | 10:39 | 23:15 | 01:04 | 13:39 | 02:04 | 14:39 | 00:34 | 13:09 | 01:49 | 14:24 |